## Illir útróðrarmenn

Útróðrarmenn í Hammerfest og aðrastaðni í Norðurnoregi eru illi inn á Helgu Petersen, fiskimálaráðharra, sum hevur skotið upp at broyta kvotuskipanina. Uppskot hennara ber millum annað í sær, at kvotur hjá bátum undir 15 metrar kunnu leggjast saman. Útróðrarmenninir bera ótta fyri, at tað fer at beina fyri útróðrarflotanum, tí tað verður alt ov dýrt hjá ungum monnum at fáa sær egnan bát, og at úrtøkan í útróðrinum fer at minka.

## Føroysk orðabók á netinum

Orðabókagrunnurin hevur fingið heimasíðu og hevur nú lagt Móðurmálsorðabókina á netið. Við nýggjum viðtøkum í 2003 gjørdist grunnurin minni heftur at øðrum stovnum og verður tí sum frá líður sjónligari. Fyrsta útgávan hjá grunninum undir egnum navni er á neti heldur enn á prenti – áðurnevnda netútgáva av føroysku orðabókini. Orðabókagrunnurin hevur fingið heimasíðuna www.obg.fo. Føroyska orðabókin – móðurmálsorðabókin - kom út fyri níggju árum síðani. Í tíðindaskrivi sigur orðabókagrunnurin, at sum meginregla eiga allar meginorðabøkur at verða endurskoðaðar og givnar út av nýggjum. Grunnurin fyrireikar í løtuni orðabøkur millum føroyskt og týskt og millum føroyskt og danskt, men enn vanta orðabrýr til onnur stór heimsmál og grannamál, umframt at stórur tørvur er á serligum orðabókum, til dømis skúlaorðabókum, tøkniorðabókum og teldutøkum orðabókum.

# Løgmaður harmast norðurlendskan ungdóm

**Norðurlendskur ungdómur fór av sporinum í eini fordømandi niðurstøðu um føroyingar, heldur Løgmaður**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki grundarlag fyri at koma til ta niðurstøðu, at samkynd verða avbukað og illa happað í Føroyum.

Tað fær Norðurlendska Ungdómsráðið nú at vita í einum almennum skrivi frá Føroya Løgmanni.

Í vár hevði Norðurlendska Ungdómsráðið fund, har tað gjørdi eina fundarsamtykt, har tað stendur, at tað hevur ført til harðskap og grova forfylging av samkyndum, at løgtingið feldi eitt uppskot um at grein 266-b í revsilógini eisini skuldi umfata samkynd.

Jógvan Við Keldu, løgtingsmaður, varð so fortørnaður um hesa samtyktina, at hann vildi hava løgmann at vísa henni aftur.




*Norðurlendskur Ungdómur gevur eina skeiva og reingjandi mynd av støðini í Føroyum og tað harmast Løgmaður um. Jóannes Eidesgaard fer nú at gera vart við sína misnøgd í almennum brævið til Norðurlendska Ungdómsráðið*

Løgmaður sigur, at hann hevur kannað málið hjá fútanum.

Hann helt, at tað var neyðugt, tí allar niðurstøður máttu byggja á rættvísandi grundarlag.

Men við ávísum fyrivarni, svarar fútin, at eftir hagtølunum hjá løgregluni, og eftir tí, sum løgreglan annars veit, er onki grundarlag fyri at halda, at samkynd fyri meiri harðskapi ella forfylging, enn onnur.

### Alment harmaskriv

Løgmaður sigur, at nú fer hann at senda Norðurlendska Ungdómsráðnum bræv, har hann harmast um teirra misvísandi mynd av Føroyum.

- Tað er ómetaliga harmiligt, tá ið fólk verða álopin ella forfylgd, sama hvør orsøkin er og vit fara at gera, alt, sum stendur í okkara makt, fyri at verja rættin hjá øllum borgarum, sama hvønn kynsligan samleika teir hava, sigur Løgmaður í skrivinum til Norðurlendska Ungdómsráðið.

Og hann leggur afturat:

Men at påstå, at en nedstemning av lovforslag om diskriminationsbeskyttelse for homoseksuelle på Færøerne, har ført til vold mod homoseksuelle og omfattende forfølgelseaf homoseksuelle, er mildest talt at drage en konklusion, der ikke er belæg for.

Annars leggur Løgmaður afturat í brævinum, at sjálvur er hann sera fegin um, at 266-b, nú eisini fevnir um samkynd.

- Hetta er ein sigur fyri okkum, sum stríðast fyri javnbjóðis rættindum til allar borgarar.

Hann skoytir upp í, at vit skulu sjálvandi ikki góðtaka harðskap, hvørki ímóti samkyndum ella nøkrum øðrum.

Men hann sigur at enda, at hann vísir aftur, at tað er umfatandi forfylging av samkyndum í Føroyum.

- Tað er ein reingjandi og skeiv mynd av støðuni, staðfestir Løgmaður.

# Løgmaður skal halda fingrarnar vekk



*John Johannessen mælir Løgmanni staðiliga til frá at gera meiri við málið, tí hann hevur ikki rætt at stýra ella at sensurera meiningarnar hjá øðrum*

**Í Føroyum er tiltikna grein 266-b í revsilógini alt annað enn steindeyð og jarðað og Jógvan við Keldu heldur, at John Johannessen minnir mest um ein illan puddilhund**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Løgmaður eigur at halda fingrarnar vekk.

Tað heldur partamaður hansara, John Johannesen.

Sum tað stendur í greinini omanfyri, ætlar Løgmaður at senda Norðurlendska Ungdómsráðnum eina skrivliga rættleiðing fyri niðurstøðuna, sum ráðið hevur gjørt um viðurskiftini hjá samkyndum í Føroyum.

Løgmaður sigur, at hann hevur spurt Fútan um hald er í niðurstøðuni hjá Norðurlendska Ungdómsráðnum um, at samkynd í Føroyum eru fyri harðskapi og verða illa happað av tí, at Løgtingið hevði felt eitt uppskot um at lata tiltiknu grein 266-b fevna um samkynd eisini.

Fútin hevur svarað, at hann hevur ikki ábendingar um, at samkynd í Føroyum eru harðari rakt av harðskapi enn onnur.

Og nú ætlar Løgmaður sær at senda Norðurlendska Ungdómsráðnum eina skrivliga rættleiðing.

Tað ger hann eftir, at Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, alment heitti á Løgmann um at vísa útsøgnunum hjá Norðurlandaráðnum aftur, tí hann meinti, at tær skaða umdømi Føroya.

Men John Johannessen, løgtingsmaður og partamaður hjá Løgmanni, mælir honum staðiliga frá at gera meiri við málið.

- Løgmaður hevur boðað frá, at hann hevur kannað málið hjá fútanum og eg vil staðiliga mæla honum frá at fara longri inn í málið, segði javnaðartingmaðurin, John Johannessen.

Hann segði, at hetta snúði seg um frælsið hjá fólki til at hava egnar meiningar.

Norðurlendska Ungdómsráðið er ikki eitt løggevandi ting, men ein samkoma, sum stendur á einum skipaðum, politiskum palli og sum hevur nakrar meiningar.

- Men tær meiningar eigur Føroya Løgmaður ikki at stýra ella at sensurerað.

John Johannessen vildi eisini hava at vita, hvønn rætt Jógvan við Keldu hevur at heita á Løgmann um at boða Norðurlendska Ungdómsráðnum frá, at tey hava ikki loyvið til at hava eina hugsan um hesi viðurskiftini.

### Langt frá deyð og jarðað

Tað sum síðani fór fram í Løgtinginum, vísti týðiliga, at tiltikna grein 266-b í revsilógini, er alt annað enn deyð og jarðað.

Teir, sum vundu seg mest upp, vóru teir báðir fólkafloksmenninir, Óli Breckmann og Jógvan við Keldu.

Óli Breckmann takkaði Løgmanni fyri, at hann hevði tikið málið upp.

- Hetta er ikki annað enn eitt slag av nýreligiøsiteti, har vanliga siðalagið í Føroyum skal skiftast út við nakað nýtt.

Hann helt, at hetta málið vísir, hvussu djúpt knæfall vit eru til reiðar at gera fyri at tilbiðja hesi nýggju smáreligiøsu dyrkanini av ymsum undarligum.

Hann vísti eisini til ætlaðu umhvørvisvikuna í Havn, "har tey helst fara at tilbiðja stórhvali, ozonlagi og golfstreyminum".

Jógvan við Keldu var eisini í øðini inn á John Johannessen og helt, at hann minti mest um ein puddilhund, sum onkur fín frúa hevði parkerað í bandi uttanfyri ein handil og sum bara stóð og goyði eftir øllum, sum komu framvið, tí hann skuldi partú vera ímóti øllum.

Hann helt annars, at rættaði Løgmaður ikki Norðurlendska Ungdómsráðið í hesum føri, røkti hann ikki sína uppgávu.